# TÓNLEIKUR FYLLUR TÓMA RÚMIÐ

Vit hava biðið gittarleikaran í Lama Sea Jón Klæmint um at valt 5 tær bestu fløgurnar í fløgusavninum, eitt savn í vísir, at her er talan um ein tónleikara við einum sera fjølbroyttum tónleikaáhuga, og einum brennandi kærleika til tónleikin

Niels Uni Dam,
nielsuni@sosialurin.fo

Jón Klæmint Hofgaard er sjarmerandi gittarleikarin í Føroya glaðasta bólki Lama Sea. Seinasta árið hevur Lama Sea spælt seg beint inn í hjørtuni á føroyingum við sínum lívgevandi tónleiki og altíð fullkomiliga peppaðu framførslum.

Lama Sea gjørdi vart við seg í Prix Føroyum í fjør, har bólkurin endaði í hálvfinaluni á Tvøroyri. Prix luttøkan gjørdi bólkin kendan um allar Føroyar og við framførslum á MjúS, G! Festivalinum og Ólavsøkukonsertini spældi Lama Sea seg upp í millum best umtóktu tónleikanøvnini í Føroyum. Bólkurin gjørdist alsamt betur, og tá hann í GBOB finaluni megnaði at ogna sær annað pláss beint í hølunum á Marius, var greitt, at hetta var ein av Føroya allar bestu bólkum.

Á Planet Awards var Lama Sea í uppskoti til planetina fyri besta bólk og fyri besta nýggja bólk. Eitt satt bragd fyri ein so nýggjan bólk. Lama Sea er ein sterkur bólkur á flestu økjum, men umframt sangaran Janus Rasmussen, er tað Jón Klæmint á gittara, ið hevur ein tann mest markanta leiklutin. Vit hava roynt at fingið betur innlit í, hvar íblásturin hjá Jón Klæminti kemur frá.

Jón Klæmint sigur, at tónleikur hevur ótrúliga nógv at siga fyri hann. Tónleikur fyllur tað tóma rúmið. Tá eg til dømis eri einsamallur inni, so tendri eg tónleik, og so eri eg ikki einsamallur. Tónleikur er sum ein persónur, sum altíð er har, greiðir Jón Klæmint frá.

Hann sigur, at hvørja genru tónleikurin hoyrir undir er líkamikið. Honum dámar væl at hoyra tónleikarar útrykkja seg í gjøgnum ymiskar genrir. Hann sigur, at hann verður inspireraður av ymiskum, og at hetta hevur t.d. ávirkan á akkord val og annað í hansara gittarspæli í Lama Sea.

Júst hetta fjølbroytni ber fløgusavnið hjá Jón Klæminti eisini brá av. Her er sera nógvur ymiskur tónleikur. Vit hava saman við Jón Klæminti grópa í fløgusavninum, og biðið hann valt tær fimm fløgurnar, ið honum dámar allar best. Hann viðgongur, at hetta er ikki ein løtt uppgáva, og at hann um nakrar dagar kanska fer at angra, at hann ikki valdi onkra ávísa fløgu. T.d. nevnir hann bæði Flaming Lips og The Libertines, sum upplagdar kandidatar til listan, sum tó ikki sluppu við.



1

5 teir bestu

## SONDRE LERCHE - TWO WAY MONOLOGUE (EMI MUSIC NORWAY: 2004

Eg hoyrdi lagið Two Way Monologue hjá Sondre Lerche á MTV, og fall eitt sindur fyri tí beinanvegin. Eg hugsaði, hvat er hatta? Hatta havi eg ongantíð hoyrt um. Eitt sindur seinni var eg í Norra og har sá eg fløguna og keypti hana. Hon minnir meg tí eisini um Norra.
Hetta er ein øgiliga frísk fløga, Hon er væl produsera og væl spæld. Bólkurin hjá Sondre Lerche er ordiliga góður. Hann brúkar eisini feit ljóð, er eitt sindur elektroniskur. Sondre Lerche er nokkso inspireraður av The Beach Boys. Hann brúkar nógvar røddir og kór, tað er sovorðið, sum eg elski. Røddin hjá Sondre er eisini góð, tað er behagiligt og lekkurt at lurta eftir henni.

## DJANGO REINHARDT - GENIOUS OF IMPROVISATION (DEFINITIVE: 2005)

Fløgan Genious Of Improvition hjá Django Reinhardt er fantastisk. Stílurin hjá Django er Gypsi Swing, sum er ein tann feitasti stílurin, sum er. Hetta er ótrúliga festligur og lívligur tónleikur. Django Reinhardt er ein ótrúligur innovator og ein sublimur gittaleikari. Í einum óhappi misti hann førleikan í fleiri fingrum, og spælir tí bara við peikifingri og longutong. Hetta ger hansara spæl øgiliga eyðkent. Hann brúkar øgiliga nógvar trígja tóna akkordir, og hevur eina nokkso simpla akkord gongd. Hetta er eisini tónleikur, sum er ótrúliga stuttligur at spæla, tí hann spælir so skit skjótt. Woody Allen brúkar ofta Django Reinhardt í sínum filmum.

## THE STROKES - IS THIS IT (ROUGH TRADE/RCA: 2001)

Is This It hjá The Strokes er ein genial fløga. Hon er ordiliga gjøgnumførd. The Strokes hevur ein nokkso simplan stíl, sum riggar væl. Teir hava nokkso serlig riff, tey virka eitt sindur, sum um tey eru brúkt fyrr, men alíkavæl ikki. Sangarin Julian Casablanca er genialur og skrivar allan tónleikin hjá teimum, men mær dámar eisini væl gittarleikararnar, sum eru øgiliga inspirerarandi. Eg keypti fløguna í USA, so eg havi ikki tann vanliga húsan, men ein annan sum varð gjørdur til amerikanska marknaðin.
Mær dámar serliga væl løgini Soma, The Modern Life og Hard To Explain.

## PAT METHENY - IMAGINARY DAY (ECM: 1997)

Tað ljóðar eitt sindur løgið, men Imaginary Day hjá Pat Metheny er nakað av tí fyrsta tónleikinum, ið eg lurtaði eftir. Hetta er fussiónsjassur, øgiliga kompliseraður tónleikur við snedigum taktum. Hetta er nokkso suður amerikanskt og rættiliga etniskt. Okkurt lag er eisini nokkso elektroniskt. Pat Metheny er ein ótrúligur gittarleikari, sum inspirerar meg sera nógv. Hansara ljóð er øgiliga gott. Hann var ein tann fyrsti, sum tók synth ljóð inn í jassin.
Eg haldi, at tað fyrsta sum fangaði var, at sangirnir hava so penar melodiðir. Men eisini at hetta er so stórsligin tónleikur - har eru øgiliga nógvir limir í bólkinum.
Eg keypti hesa fløguna, tá eg var í USA, og hon minnir meg um túrin. Eg lurtaði eftir henni, meðan eg koyrdi í tok í USA.

## JEFF BUCKLEY - GRACE (COLUMBIA 1994)

Fløgan Grace hjá Jeff Buckley er orsøkin til, at eg byrjaði at spæla gittar aftur. Eg fekk hana frá systir míni, tá eg gekk í 8. flokki, og tað eri eg taknemmiligur fyri - tí hetta er tann fløgan, sum hevur inspirera meg nógv mest.

Hon var tung at lurta eftir í byrjanini. Halleluja var tað fyrsta lagið, sum fangaði meg. Tað gjørdist eitt slag av ferð gjøgnum fløguna, og mær dámdi skiftandi løg av henni, jú oftari eg hevði lurta eftir henni.
Hetta var næstan tann einasta fløgan, ið eg lurtaði eftir í longri tíð. Grace er ikki bara ein fløgu, sum eg seti á. Hon krevur rættiliga nógv av lurtaranum, tí hon er so øgiliga innilig. Hetta er medisin fyri oyruni. Eg fái gásarhold, tá eg hoyri hana. Eg haldi, at hon lýsir orðið grace ordiliga væl.